## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, turt og sólgottar. Seinnapartin frískar hann vindin av eystri. Hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri, men um kvøldið minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinni av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólgottar og hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, seinni frískar hann vindin av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar, men týsdagin møguliga avfall. Hitalagið millum frostmarkið og ÷4 stig.

# 50.000 samlarar bíða eftir sirkusfrímerkjunum

**Frímerkjadeildin avdúkaði í gjár vinnararnar til frímerkjakappingina, sum varð útskrivað í august mánaða í fjør. Børnini skuldu tekna sirkus**

KAPPING
*Ingrid Bjarnastein*

Ein rúgva av børnum vóru samlað á Frímerkjadeildini á Argjum fyrrapartin í gjár. Tí í gjár vórðu vinnararnir funnir til frímerkjakappingina, har tvær tær bestu tekningarnar verða útgivnar sum frímerkir í apríl 2002.

10 tær bestu myndirnar av teimum 1173 innsendu myndunum vórðu tiknar burturúr og lagdar út á internetið. Har hava øll, ið hava havt hug kunna atkvøtt fyri, hvat var besta frímerkið. Atkvøðugreiðslan endaði 2. januar 2002 og í gjár fingu tær 10 myndirnar, ið hava ligið á internetinum virðislønir, og vinnarin varð eisini funnin.



*10 tey bestu í frímerkjakappingini hjá Postverki Føroya: (f.v) Angela úr Fres. Nr 1 Anna Katrina Olsen, 2 Sára Zachariassardóttir, 3 Linda Sivertsen, 4 Jón Absalonsen, klovurin Hannibal. (fram. f.v) 5 Birna Jespersen, 6 Rakul Á. Jacobsen, 7 Jón Jensen, 8 Elsa Magnussen, 9 Maria Absalonsen og Elin Weihe.*
Mynd: Jens Kr. Vang

**Hannibal, Oskar og Angela**

Millum børnini í gjár vóru eisini Angela úr Fres, klovnurin Hannibal og dukkan Oskar. Børnini høvdu øll fingið hvør sín lutaseðil, og 23 vinningar vórðu burturlutaðir. Angela og Hannibal undirhildu eina løtu og spældu eisini vatnkríggj.

Tá teir 23 vinningarnir vóru fingnir uppá pláss, vórðu vinnararnir funnir.

Bergur í Garði, stjóri á Postverki Føroya segði, at millum 40.000 og 50.000 frímerkjasamlarar runt um í heiminum bíðaðu eftir sirkusfrímerkjunum, sum børnini høvdu teknað.

Nummar 10–3 fingu handað ein kekk uppá 1000 krónur, meðan nummar tvey og eitt fingu ávíkavist 2500 krónur og 5000 krónur. Sára Zachariassardóttir varð nummar tvey, meðan Anna Katrina Olsen úr Venjingarskúlanum fekk handað 5000 krónur fyri bestu tekningina.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷4 |
| Nuuk | ÷5 |
| Qaqortoq | ÷4 |
| Ammassalik | ÷12 |
| Saint John's | ÷9 |
| Halifax | ÷5 |
| Reykjavík | ÷4 |
| Seyðisfjørður | ÷3 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 1 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 10 |
| Tromsø | ÷7 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷1 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | ÷9 |
| Moskva | 3 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 12 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 18 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | 8 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 34 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 977 hPa. yvir Norðsjónum fer í landnyrðing og dýpist.Eitt annað lágtrýst, 970 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer norðureftir.




Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani fer móti Skotlandi.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/01 kl. 06[00]– 24/01 kl. 06[00]. Hitin í gjár: ÷1,2°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 23/01 kl. 06[00]– 24/01 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 161,3 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

18. jan.: Mánin longst frá jørðini
21. jan.: Fyrra kvarter
28. jan.: Fullmáni
30. jan.: Máninnæstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. jan | 03.18 | 15.43 | 02.18 | 14.43 | 02.33 | 14.58 | 05.18 | 17.43 | 06.18 | 18.43 | 01.33 | 13.58 | 00.33 | 12.58 | 03.33 | 15.58 | 04.33 | 16.58 | 03.03 | 15.28 | 04.18 | 16.43 |
| 26. jan | 04.08 | 16.34 | 03.08 | 15.34 | 03.23 | 15.49 | 06.08 | 18.34 | 07.08 | 19.34 | 02.23 | 14.49 | 01.23 | 13.49 | 04.23 | 16.49 | 05.23 | 17.49 | 03.53 | 16.19 | 05.08 | 17.34 |
| 27. jan | 05.01 | 17.28 | 04.01 | 16.28 | 04.16 | 16.43 | 07.01 | 19.28 | 08.01 | 20.28 | 03.16 | 15.43 | 02.16 | 14.43 | 05.16 | 17.43 | 06.16 | 18.43 | 04.46 | 17.13 | 06.01 | 18.28 |
| 28. jan | 05.57 | 18.22 | 04.57 | 17.22 | 05.12 | 17.37 | 07.57 | 20.22 | 08.57 | 21.22 | 04.12 | 16.37 | 03.12 | 15.37 | 06.12 | 18.37 | 07.12 | 19.37 | 05.42 | 18.07 | 06.57 | 19.22 |